# Søkt verður eftir málsviðgera

## til Barnaverndartænastuna og Sosialu Deild hjá Porkeris- og Vágs Kommunu

Kundi tú hugsa tær at haft ávirkan á arbeiði í barnaverndar- og sosialum viðurskiftum í Porkeris- og Vágs kommunu?

**Arbeiðsøki:**
Arbeiði umfatar at umsita og tilrættisleggja ásetingar í lóggávuni, sum Barnaverndartænastan og Sosiala Deild varða av. Millum annað kemur tú í tøttum samstarvi við leiðaran at taka tær av málsviðgerð av barnaverndarmálum og umsiting av børnum við serligum tørvi sbrt. § 5 í dagstovnalógini.

Arbeiði er fjølbroytt og umfatar, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði, m.a. heimavitjanir, at ráðgeva børnum og/ella familjum teirra, at samstarva við og seta stuðlar í starv.

Arbeiðið umfatar somuleiðis samskifti og tvørfakligt samstarv við skúlar, dagstovnar/dagrøktir, læknar, heilsufrøðingar, løgreglu, almennar stovnar o.o.

**Vit vænta av tær:**
- At tú ert sosialráðgevi, ella tú í minsta lagi hevur aðra viðkomandi miðallanga útbúgving.
- At tú hevur arbeiðsroyndir innan málsviðgerð í almennari umsiting og/ella hevur royndir frá barnaverndararbeiði.
- At tú ert fleksibul og hevur góð samstarvsevnir
- At tú ert ábyrgdarfull/ur, miðvís/ur og sjálvstøðug/ur í arbeiðnum.
- At tú ert nærverandi og hevur umsorgan fyri barnsins tørvi.
- At tú hevur góðan teldufiørleika
- At tú hevur góðan kunnleika í føroyskum máli.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- eitt spennandi og fjølbroytt arbeiði
- møguleika fyri sjálvstøðugari støðutakan innanfyri avtalaðar karmar
- møguleika fyri persónligari og fakligari menning innan virkisøkið

**Setunarviðurskifti:**
Starvið verður sett skjótast til ber og fyribils í 2 ár. Arbeiði er fulla tíð og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Umsókn:**
Hevur starvið tín áhuga, send so skrivliga umsókn saman við avriti av prógvum og viðmælum til Sosialu Deild, í seinasta lagi 10. mai 2010 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kirstin Strøm Bech, stýrisformann á telefon 733004.

Um ikki nógv nógvir umsøkjarar eru til starvið, tilskilar Sosiala Deild sær rætt til at søkja umaftur.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
Við Á 8 · 950 Porkeri
Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04
T-post: sosialadeild@email.fo

Starvslýsing

Heimatænastan

## Endurlýsing eftir frítíðaravloysarum til Røktarheimið á Mørkini og til Heimatænastuna í øki 2

Orsaka av væntandi tal av umsókum, verður søkt eftir heilsurøktarum til Røktarheimið á Mørkini og eftir sjúkarrøktarfrøðingum til Heimatænastuna í øki 2: Vágar/ Norðstreymoy í tíðarskeiðnum frá 1. juni til 31. august 2010.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum avvarðandi fakfeløg og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær Øksiskrivsstovuna á tlf. 333249 ella til Røktarheimið á Mørkini á tlf. 471050.

Skrivlig umsókn við avriti av møgulingum viðmælum og prógvum v.m. skal sendast til:

Heimatænastan øki 2
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

Stílað: Sonja Klein

**Umsóknarfreist: 12. mai 2010.**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Børn & Ung

## Leiðari til nýggja bú- og viðgerðarstovnin

Nýggi bú- og viðgerðarstovnurin, fyri børn og ung við atferðar- og tillagingar trupulleikum, søkir eftir leiðara. Starvið verður at seta 1. juni 2010 ella skjótast tilber.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Nærverkið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Minnu Poulsen, leiðara, ella Mary í Garði, stjóra, tlf. 360000

**Umsókn:**
Umsóknir skulu sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26, Argir
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
stílað: Minna Poulsen, leiðari fyri Børn & ung

ella til teldupostadressu:
naerverk@naerverk.fo

**Umsóknarfreist: 17. mai 2010.**

Lesið alla lýsingina á heimasíðu okkara:
www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo



SKÚLAFLOKKAR · ÍTRÓTTARFELØG · PENSJÓNISTAR · ARBEIÐSPLÁSS · BINDIKLUBBAR · GONGUFELØG
Vælkomin til Íslands
Skipað verður fyri ferðum kring Ísland, m.a. til Gullfoss, Geysir, Tingvellir og Bláa Lón.
TOSAÐ VERÐUR FØROYSKT

Bæði stórir og smáir bussar
Tel. +354 861 3426 · davidsam@simnet.is
Davíð Samúelsson,
Góðkendur ferðaleiðari

Sp/f. GRAVSTEINAR

Velbastaðvegur 45
Box 336
110 Tórshavn
Tlf. 320370
Fax. 321470
Far. 214270
Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰
annars sambært avtalu.
Nýggj vøruskrá fæst!
Sjónband · 31 77 74

www.fjorukrogvin.fo
• Matstova
• Søgusavn
• Gávubúð
FJØRUKRÓGVIN
Restaurant ~ Bar
Tel. 471500 / 771500

STILLADS LEIGA
Absolutt bíligast!

GUTTORM MORTENSEN
www.stilladsleiga.com
TELEFON 25 11 60